LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2,
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 24. apríl 2023
J.Nr.: LUM-16- 22/20549-8
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 22/20516

**Viðvíkjandi vantandi eftirliti við eldraøkinum**

Sambært lógini um málsøkjabýti (lóg nr. 164 frá 22. desember 2022 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninar) er tað landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, sum situr fyri eldralógini, løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Frá 1. januar 2015 var heimatænastan, eldrarøkt o.a. lagt út til kommunurnar at umsita (lóg nr. 20 frá 7 apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.). Evsta ábyrgd av eldraøkinum er tó framvegis hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum.

Í sambandi við, at eg ynskti at kunna meg um eldraøkið og umsitingina av tí, sendi eg tann 9. november 2022 soljóðandi skriv til Almannamálaráðið:

> "Løgtingsins umboðsmaður ynskir at kunna seg um eldraøkið,
>
> Sambært § 11 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. skulu avtalurnar um skipan av samstørvum og kommunalar samstarvsavtalur um skipan av heimatænastu, eldrarøkt v.m. og fráboðan frá Tórshavnar kommunu um teirra skipan av eldraøkinum, góðkennast av landsstýrismanninum.
>
> Sum innleiðing til kunning um eldraøkið verður heitt á Almannamálaráðið um at lata umboðsmanninum avrit av teim í § 11 nevndu góðkendu avtalum. "

Tann 24. november 2022 sendi Almannamálaráðið mær umbiðnu samstarvsavtalurnar, sum ráðið hevði góðkent.

Í sambandi við gjøgnumgongd av nevndu samstarvsavtalum og fráboðanini frá Tórshavnar kommunu, hefti eg meg við, at spurningurin um, hvussu kommunurnar ætlaðu at skipa eftirlitið

við tænastunum sambært eldralógini ikki tyktist endaliga viðgjørdur og avgreiddur frá ráðnum. Tann 27. januar 2023 sendi eg Almanna- og mentamálaráðnum soljóðandi skriv um hesi viðurskifti:

> “Eg havi nú gjøgnumgingið avtalurnar, sum landsstýriskvinnan í almannamálum í 2014 góðkendi samsvarandi § 11 í lógini um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., tá umsitingin av eldraøkinum varð løgd út til kommunurnar.
>
> Sum partur av innleiðandi kunningini um eldraøkið, havi eg eisini lisið frágreiðingina um eftirmeting av eldraøkinum, sum ein arbeiðsbólkur gjørdi í desember 2021.
>
> Eg havi heft meg við, at viðvíkjandi spurninginum um, hvussu eftirlitið við økinum verður skipað, vísa góðkendu avtalurnar til, at eftirlitið hjá kommununum verður skipað sambært galdandi lógum og reglum ella til ætlaða kunngerð sambært § 19, stk. 3 í løgtingslóg nr. 19 um heimatænastu og eldrarøkt frá 7. apríl 2014.
>
> Av frágreiðingini um eftirmeting av eldraøkinum kann tó staðfestast, at kommunurnar ikki hava framt nakað eftirlit við sínum tænastum á eldraøkinum, síðani tað var útlagt, og at alt bendir á, at tað er tørvur á greiðari reglum og mannagongdum, hvat eftirlitinum viðvíkur.
>
> Eg undrist um hesa støðu og havi tí avgjørt, at kanna hesi viðurskifti nærri.
>
> Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur evstu ábyrgd av eldraøkinum og varðar av lógini um heimatænastu og eldraøkt. Eg fari tí at biðja Almanna- og mentamálaráðið um at greiða mær frá støðuni við eftirliti á eldraøkinum, herundir um tað er rætt skilt, at nevndu avtalur eru góðkendar út frá ætlaðum reglum, og at hesar reglur ikki eru gjørdar enn, hóast økið var útlagt í 2015. Eisini verður ráðið biðið um at greiða frá, hvat er gjørt við spurningin um manglandi eftirlit og manglandi reglur fyri eftirliti, síðan frágreiðingin um eftirmeting av eldraøkinum kom í desember 2021.”

Tann 16. mars 2023 svaraði Almanna- og mentamálaráðið:

> “**...** Tá ið lógin um heimatænastu, eldrarøkt v.m. kom í gildi, og økið varð lagt út til kommunurnar í 2015, varð lagt upp til at kommunurnar sjálvar skuldu hava eftirlit við bústøðum, tilboðum og tænastum, sum verða veitt sambært lógini. Í serligum viðmerkingunum til § 19 um eftirlit eru 4 ymisk uppskot nevnd um, hvussu eitt eftirlit kann skipast.
> Landsstýrismaðurin í almannamálum fekk við § 19, stk. 3 heimild til at áseta nærri reglur um eftirlit. Í serligu viðmerkingunum til lógaruppskotið varð tilskilað, at heimildin kundi nýtast, um tað vísti seg at vera tørvur á greiðum mannagongdum og reglum um eftirlit.
>
> Í samstarvsavtalunum stendur, at eftirlitið skal skipast sambært kunngerð eftir § 19, stk. 3 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., og Almanna- og mentamálaráðið kann bert staðfesta, at hendan kunngerð ikki er gjørd.

Leggjast kann afturat, at tað eftirlit, sum verður framt á eldraøkinum, er eftirlitið hjá landslæknanum. Her er talan um eitt heilsufakligt eftirlit, har landslæknin hevur eftirlit við løggildum heilsustarvsfólkum.

*Viðvíkjandi eftirmetingini av eldraøkinum*

Almanna- og mentamálaráðið er farið undir eina tilgongd saman við Kommunufelagnum at hyggja eftir tilmælunum, sum arbeiðsbólkurin, sum gjørdi eftirmetingina, kom við í desember 2021. Hugt verður eftir tilmælunum og viðgjørt hvørjar lógarbroytingar skulu gerast og annað."

## Lógargrundarlag

Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m..

**§ 19** Kommunurnar hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum eftir hesi lóg.
stk. 2. Kommunan kann steðga virksemi og tænastum sambært hesi lóg, um krøvini í lógini ikki verða hildin.
stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit.

Almennu lógarviðmerkingunum til § 19. eru soljóðandi:

" Kommunurnar skulu hava eftirlit við egnum virksemi sambært hesi lóg. Kommunurnar leggja sjálvar eftirlitið til rættis, og skal eftirlitið verða partur av teimum samstarvssáttmálum, sum kommunurnar verða álagdar at gera sambært løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.. Sí í hesum sambandi serligu viðmerkingarnar, sum nevna dømi um, hvussu hetta kann skipast. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit, um tað vísir seg at vera tørvur á tí.

...

Lógin er sum áður nevnt ein rammulóg, sum hevur til endamáls at seta yvirskipaðar karmar um virksemið hjá kommununum, tá tær umsita eldraøkið. Í hesum sambandi er álit eitt betri útgangsstøði enn eitt væl útbygt eftirlit, og mett verður, at holli fakligi førleikin á økinum saman við ábyrgd kommununnar fyri egnum borgarum, eigur at vera tað grundstøði, sum tænastan byggir á. Havast skal eisini í huga, at Føroyar eru eitt so mikið lítið land, har tað er sera stutt frá borgara til myndugleika og frá borgara til fjølmiðlarnar. Afturat formliga eftirlitinum við økinum, er hetta eitt óformligt eftirlit, sum hevur týðandi ávirkan á, at myndugleikarnir røkja sínar tænstuskyldur.

Orsøkin til, at hesin leistur er valdur, har kommunurnar, afturat eftirlitinum hjá landslæknanum, hava eftirlit við egnum virksemi, er í fyrstu syftu, at tað við hesum verður eitt so greitt ábyrgdarbýti innan tænastuna sum gjørligt. Umskipanin merkir, at kommunurnar fult og heilt hava ábyrgdina av tænastunum sambært lógini, og verður tað kommunali myndugleikin sum skal tryggja, at økið verður fyrisitið í samsvari við lógina. Í dag er einasta formliga eftirlitið á økinum tað eftirlit, sum landslæknin fremur. Kommunurnar yvirtaka við øðrum orðum tær heimildir og skyldur, sum landið í dag hevur, eisini hvat eftirliti viðvíkur. Tó verða kommunurnar álagdar at skipa eftirlit við egnum virksemi; eitt eftirlit sum ikki er til í dag. Sostatt kann sigast, at talan verður um eitt betri formligt eftirlit, við tænastuni enn í dag.

...

Hoyringspartar vísa á, at tað er óheppið, at kommunurnar skulu hava eftirlit við egnum virksemi. Í hesum sambandi eru almennu viðmerkingarnar, sum snúgva seg um eftirlit, útbygdar við meiri neyvum grundgevingum fyri, hví tað verður mett nøktandi og fakliga ráðiligt at skipa eftirlitið á tann hátt, sum uppskotið leggur upp til (sí viðmerkingar omanfyri um eftirlit). Afturat hesum er lógaruppskotið um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt, v.m. bygt út, soleiðis at kommunurnar í samband við samstarvssáttmálarnar eisini skulu semjast um, hvussu eftirlitið verður skipað undir kommunalum myndugleika."

Serligu lógarviðmerkingarnar til § 19 eru soljóðandi:

"Kommunurnar hava skyldu at tryggja, at ásetingarnar í hesi lóg verða fylgdar. Til tess at tryggja hetta, skulu kommunurnar hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum, sum eru veitt sambært hesi lóg.

Kommunurnar leggja eftirlitið til rættis í avvarðandi kommunalum samstarvi. Eitt álítandi og fakliga dygt eftirlit kann fáast til vega á ymiskan hátt. Ein møguleiki er, at kommunurnar skipa seg við sínámillum eftirliti, so kommunalu samstørvini hava eftirlit hjá hvørjum øðrum. Ein annar møguleiki er, at kommunurnar ganga saman og skipa seg við einari felags eftirlitseind, einum interkommunalum eftirliti. Ein triði møguleiki er, at kommunurnar gera avtalu um, at eitt av samstørvunum hevur eftirlitið um hendi fyri allar kommunurnar. At enda kann hugsast, at eftirlitið kann verða keypt uttanlands.

Landslæknin fremur heilsufakligt eftirlit á røktarheimum og sambýlum innan Heimatænastuna og eldrarøktina. Eftirlitini eru løgd í fasta legu og verða fíggjað við fastari játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Landslæknin fremur eisini heilsufakligt eftirlit við stovnum innan Trivnaðardepilin.

...

Kommunurnar hava heimild til at fremja tær umskipanir innan økið, sum verða mettar neyðugar til tess at liva upp til ásetingarnar í hesi lóg. Í evsta føri kunnu kommunurnar sambært ásetingina í § 19, stk. 2, steðga virkseminum á heimum, røktarheimi, dagtilhaldi ella aðrari tænastu sambært lógini, um krøvini í lóggávuni ikki verða hildin, ella tað á annan hátt ikki er ráðiligt at loyva tænastuni at halda áfram. § 19, stk. 3 ásetur heimild hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um eftirlit. Heimildin kann nýtast, um tað vísir seg at vera tørvur á greiðum mannagongdum og reglum, hvat eftirliti viðvíkur."

<u>Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.</u>

§ 6, stk. 1 Kommunal samstørv, sbrt. § 4, skulu áðrenn 1. mai 2014 hava gjørt skrivliga avtalu sínámillum um skipan av samstarvinum.

§ 7, stk. 9 nr. 7)
Í samstarvsavtaluni skal semja í minsta lagi vera um:
7) Á hvønn hátt eftirlit verður skipað.

§ 9 , stk. 1, nr. 5) Áðrenn 1. mai 2014 skal Tórshavnar kommuna hava boðað landsstýrismanninum frá:
5) Á hvønn hátt eftirlit verður skipað.

§ 11, stk. 1 Avtalur um skipan av kommunalum samstørvum og kommunalar samstarvsavtalur um skipan av heimatænastu, eldrarøkt v.m. sbrt. § 4 og § 6, og fráboðan frá Tórshavnar kommunu, sbrt. § 9, skulu góðkennast av landsstýrismanninum innan 1. juli 2014.

**Niðurstøða**

Sambært § 19 stk. 1 í eldralógini hava kommunurnar eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum sambært eldralógini, og skuldu kommunurnar og kommunalu samstørvini sambært § 7, stk. 9 nr. 7) og § 9, nr. 5) í lógini um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. áðrenn 1. mai 2014 boðað landsstýrismanninum frá, á hvønn hátt eftirlit verður skipað.

Sum eg havi víst á omanfyri vístu góðkendu avtalurnar bara til, at eftirlitið hjá kommununum verður skipað sambært galdandi lógum og reglum ella til ætlaða kunngerð sambært § 19, stk. 3 í løgtingslóg nr. 19 um heimatænastu og eldrarøkt frá 7. apríl 2014. Almannamálaráðið hevði tó hvørki tá ella seinni lýst nakrar reglur um eftirlitið hjá kommununum.

Sambært § 19, stk. 3 er tað landsstýriskvinnan í almannamálum, sum kann áseta nærri reglur um eftirlitið hjá kommununum. Tá allar kommunalu avtalurnar og fráboðanin frá Tórshavnar kommunu vísti til, at eftirlitið fór at verða skipað sambært reglum, sum ráðið hevði heimild at skipað, er tað undrunarsamt, at ráðið góðkendi avtalurnar, uttan at hava tær viðkomandi reglurnar um eftirlit klárar at seta í gildi. Tá kommunurnar, í staðin fyri at skipa egnar reglur um eftirlit, vístu á reglur, sum ráðið kann áseta, átti tað at verið greitt fyri ráðnum, at einki eftirlit fór at vera framt, uttan at ráðið gjørdi tær viðkomandi reglurnar, og at tað tí var tørvur á at Almannamálaráðið ásetti reglur um eftirlitið, sum kommunurnar skulu gera á eldraøkinum.

Í frágreiðingini frá desember 2021 staðfesti arbeiðsbólkurin, sum gjørdi eftirmeting av eldrøkinum, at einki eftirlit verður framt innan heimatænastu og eldrarøktini, og at okkurt er sum týður uppá, at tað er tørvur á greiðari reglum og mannagongdum, hvat eftirlitinum viðvíkur.

Eg haldi, at tær manglandi reglurnar frá Almannamálaráðnum um eftirlit mugu metast at verða orsøk til, at kommunurnar ikki hava framt skipað eftirlit av teimum tænastum, ið tær veita sambært eldralógini.

Ráðið hevur í síni frágreiðing til mín víst á, at tað eftirlit, sum verður framt á eldraøkinum, er eftirlitið hjá landslæknanum, sum er eitt heilsufakligt eftirlit. Eg skal hesum viðvíkjandi viðmerkja, at hetta ikki frítekur kommunurnar fyri at hava egið eftirlit við sínum tænastum, tí eftirlitið hjá kommununum og heilsufakliga eftirlitið eru ikki innan sama fak- ella heimildarøki, og má hetta metast at vera orsøkin til at eldralógin ásetur, at kommunurnar hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum, ið tær veita eftir eldralógini.

Eg skal tó viðmerkja, at tað tykist mær, sum hvørki eldralógin ella viðmerkingarnar til hesa hava nágreinað, hvat eftirlitið hjá kommununum skal fevna um. Hetta mugu reglurnar frá ráðnum áseta, so greitt er, hvat endamálið er við eftirlitinum, og hvussu hetta skal fremjast. Eg kann hesum viðvíkjandi viðmerkja, at í Danmark er eftirlitið hjá kommununum á hesum øki (kap. 26 / § 151 í serviceloven og kap. 4 /§ 16 í retsikkerhedsloven) eitt persónsrættað eftirlit við, at tænastan, sum viðkomandi persónur fær, er samsvarandi givnu játtan (avgerð) og støðuni hjá persóninum, og at dygdin á tænastuni er nøktandi.

*Samanumtikið*
Eg haldi, at tað var ikki nøktandi, at Almannamálaráðið ikki ásetti reglur um, hvussu kommunurnar skuldu skipa sítt eftirlit við eldraøkinum, samstundis sum ráðið í 2014 góðkendi kommunalu samstarvsavtalurnar og fráboðanina frá Tórshavnar kommunu.

Eg haldi eisini, at tað er als ikki nøktandi, at hesar reglur framvegis ikki eru gjørdar 8 ár eftir, at eldraøkið var útlagt til kommunurnar, og at einki er hent á hesum øki síðan arbeiðsbólkurin í desember 2021 vísti á manglandi reglur um eftirlit.

Eg fari tí at mæla Almanna- og mentamálaráðnum til sum skjótast at gera reglur um eftirlit til kommunurnar at fyrisita eftir.

Eg fari at biðja Almanna- og mentamálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Avrit av skrivinum verður sent til formansskap Løgtingsins og landsstýrismannin í kommunumálum.

Skrivið verður í næstum lagt á heimasíðu okkara www.lum.fo

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður